Pison:

# Manningarparturin 47.000 krónur

**Pison var herfyri tveir túrar á Bankanum. Annar túrurin var ein av teimum heilt góðu. Teir seldu 162.000 pund og fingu 1.522.000 krónur fyri lastina. Hin túrurin varð avbrotin, tí skipið fekk ein sjógv, sum oyðilegði flestu tólini á brúnni**

FISKIVINNA
*Solby A. Eliasen*




*Skiparin á Pison, Peter Eliasen, her avmyndaður á brúnni. Mest sum øll tólini á brúnni fingu skaða, tá skipið fekk ein sjógv herfyri*

**Klaksvík:**
Línubáturin Pison er ein sera snotuligur bátur. Tað angar av sápu beint sum ein kemur umborð, og tað kann vera tekin um, at manningin gongur høgt upp í teirra yvir 40 ára gamla bát, sum tó nú sær út, sum hann er nýggjur. Og sambært teimum, sum eru við, so er hann nýggjur. Allir eru á einum máli um, at hesin er ikki tann sami sum gamli Pison. So at siga alt uttan skrokkurin sjálvur varð umbygt og umvælt í fjør, so tað er ein umfatandi broyting farin fram á skipinum.

Uppi á brúnni hoyrist prát. Tað eru skiparin, Peter Eliasen og stýrimaðurin, Tommy Sivertsen. Teir standa og práta við ein triðja mann. Sum skilst á lagnum, so er tað ein elektrikari. Hann arbeiðir við at gera ymisk tól á brúnni í stand, sum fingu skaða, tá Pison fekk ein sjógv á næstseinasta túri.

– Vit vóru staddir á vestara kantinum av Bankanum. Tað var ikki illveður, men sera ringur sjógvur, og so hendi tað, sum ein veit, altíð kann henda á sjónum, greiðir Peter frá. Teir fingu ein sjógv, skiparin gjørdi eitt gallróp um rútin, men ein maður, sum stóð á rulluni, hoyrdi hann ikki, og hann varð tí slongdur við. Hann brákaði trý rivjabein og er nú sjúkrameldaður.

– Tað breyt inn á rulluna, eg sá, at tað fór at henda, men eg mátti gera skjótt av, tí rúturin skuldi aftur, men eg náddi so at rópa áðrenn, sigur skiparin eitt sindur harmur á málinum. Hóast skiparin náddi at koyra rútin aftur, so var trýstið frá sjónum ov nógv. Mest sum øll tólini á brúnni fingu skaða. Og nógv stóð undir í vatni. Peter sigur samstundis, at serliga tá tað er ringt í sjónum, leggja teir til merkis, at hetta ikki er tann sami báturin.

– Vit skulu allir venja okkum við, at báturin er ein annar í dag. Hesin liggur nógv tyngri í sjónum, meðan hin gav seg nógv meira. Og harafturat hava vit mist nógva ferð nú, sigur Peter, sum leystliga metir, at skipið hevur mist um hálvaaðru míl. Men tað heldur hann sigur seg sjálvt, tá hugsað verður um, at skipið hevur fingið eina eykavekt upp á tilsamans 30 tons. Samstundis greiðir hann frá, at skipið uppførir seg heilt øðrvísi í sjónum nú. Men tað heldur hann bara er ein spurningur um tíð, inntil teir hava vant seg við tað. Hann er sannførdur um, at umbyggingin var ein betur loysn enn at keypa ein annan bát.

Túrurin á Bankanum, áðrenn Pison fekk sjógvin, var ein av teimum heilt góðu. Tá høvdu teir átta og eina hálva setu og fingu 162.000 pund. Ofta verður sagt, at fiskimenn ikki vilja tosa um manningarpartar, men tað letur ikki til at vera nakar trupulleiki umborð á Pison. Spurdur um tað, svarar Peter bart út, at teir seldu fyri góða hálvaaðru millión, og at manningarparturin á tí túrinum lá um 47.000 krónur. Og teir fóru útaftur so skjótt, sum teir høvdu landað, men eftir hálvaaðru setu fingu teir sjógvin og noyddust innaftur.

### Góður fiskur

Skiparin er fryntiligur og tíðindafróður. Og meðan hann vísir runt á skipinum, verður tosað um góðskuna í fiskinum. Hann heldur, at fiskurin er í góðum standi í dag. Tó sigur hann, at tað letur til, at fiskurin nærri landi er heldur rakari enn hann longri úti.

– Tað er ilt at siga, hví tað er so, men tað kundi týtt upp á, at botnurin er heldur bleytari longur út man kemur, heldur hann fyri, tá vit koma inn í snotuligu messuna. Har stendur millum annað ein brún leðursofa og sjónvarp, video og dvd. Eitt sera snøgt rúm, sum manningin hevur at hugna sær í, meðan siglt verður. Umframt hesa messuna, so hava teir eisini eina kaffistovu har frammi, sum teir nýta oftari.

– Har frammi fara teir inn í kaffistovuna í oljuklæðunum og øllum, men tað gera teir ikki her, greiðir Peter frá.

Vit fara víðari og ganga gjøgnum alt skipið, meðan skiparin greiðir frá ymiskum, sum er broytt síðani umbyggingina. Kagað verður líka inn í kaffistovuna har frammi, og tað fyrsta ein leggur merki til eru tríggjar myndir á vegginum. Ein er av gamla Pison, og hinar báðar at Hans Eriki Olsen og Jógvan Segl, sum báðir vóru við til at byrja Joensen og Olsen á sinni.

Peter og Tommy halda, at fiskiskapurin seinastu tvey árini hevur sum heild verið góður. Og prísurin serliga á toskinum hevur verið góður. Hinvegin siga teir, at hýsan hevur verið eitt sindur svikalig ta seinastu tíðina.

– Vit royna at fáa sum mest av toski, tí prísurin heldur sær á einari nøkulunda fastari legu, sigur Peter. Toskur eitt og tvey av landgrunninum liggur á umleið 25 ella 26 krónum fyri kilo, meðan toskur av bankanum fer upp um 30 krónur.

Pison roynir oftast norðanfyri og á Føroya Banka. Men nú eru og verða fleiri øki stongd, tí fiskurin gýtir hesa ársins tíð. So fiskiskapurin fer helst at minka eitt sindur nú, men tá økini lata uppaftur í apríl, verða allir línubátarnir tilreiðar at leggja í vaði aftur. Eisini Pison.



*Pison her avmyndaður, tá hann á fyrsta sinni kom aftur til Klaksvíkar eftir umbyggingina í fjør*



# Standa saman um rennibreyt í Havn

**Ein umfatandi verkætlan er sett ígongd í Havn, sum hevur til endamál at skapa umstøður fyri frælsum ítrótti við einari rennibreyt. Tórsvøllur er fremsta ynski hjá einum nýskipaðum samtaki**

RENNIBREYT
*Heri á Rógvi*



*Formaðurin í Bragdinum, Robert Vilhelmsen, ynskir at fáa eina rennibreyt um Tórsvøll, og ein áhugabólkur skal setast á stovn at leiða arbeiðið*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Prátið um eina rennibreyt í høvuðsstaðnum er aftur komið á glið. Ein bólkur við áhugaðum er farin til verka. Tað er felagið fyri tey, ið íðka frælsan ítrótt í Havn, Bragdið, sum saman við øðrum gongur undan.

Bragdið hevur arbeitt síðani mitt í fýrsunum at fáa rennibreyt í Havn. Avtalað varð gjørd við býráðið, tá oyggjaleikir tóku seg upp, um at gera rennibreyt í Gundadali. Men hetta er spakuliga førka longur og longur út. Uppskotið fekk nýggja luft við hugskotinum um Tórsvøll, men eisini her varð hálað longur og longur út, til rennibreytin heilt datt av borðinum.

– Tosað hevur verið við tveimum tungum frá býráðsins síðu. Handlingarnar hava ikki samsvarað við orðingar, sigur Robert Vilhelmsen, formaður í Bragdinum.

Tórshavnar býráð hevur seinastu trý árini játtað í alt tríggjar milliónir til eina rennibreyt. Tað er ætlanin hjá býráðnum, at hetta skal liggja úti í Marknagili við Landavegin.

– Rennibreyt í Marknagili er ikki egnað, tí har er so veðurhart. Tað er ikki bara at gera rennibreyt. Tað má passa til endamálið, og liggja á einum sentralum stað fyri ítróttin sum heild, sigur Robert.

Fyri at eitt nú met skulu vera góðkend, krevur hetta, at vindstyrkin ikki er hægri enn 2 m/s.

Robert sigur, at øll við áhuga fyri at fáa rennibreyt eru samd um, at Tórsvøllur er fremsta raðfestingin. Við neyðugu íløgunum kann rennibreytin gerast ein góð loysn.

– Størsta mótstøðan er frá Tórsvallargrunninum og tí megi, ið fólki aftanfyri grunnin hava. Men Tórsvøll eiga vit øll, og eigur at kunna tæna fleiri endamálum enn fótbólti, sigur Robert Vilhelmsen.

Verður Tórsvøllur gjørdur um til stadion við rennibreyt, so verður sjálvur fótbóltsvøllurin bert nýttur í kappingarhøpi til kappingar í frælsum. Venjingarnar í ymsu kastigreinunum mugu skipast aðrastaðni, og fótbóltsvøllurin kann sjálvandi nýtast til fótbóltsdystir.

Robert heldur ikki, at tað stórvegis høpi í at gera eitt nýtt stadion við Ringvegin.

– Rakstrarliga er tað eingin ivi, um tað lítil nytta í at hava tvey stadion, tá mann hevur trupult við at reka eitt, sigur Robert Vilhelmsen.

### Kombinera

Lagt verður upp til, at rennibreytin skal passa saman við øðrum ítróttarligum endamálið.

– Akkurát tí er Tórsvøllur er tað besta plássið. Har er veðurgott, liggur væl fyri í mun til vøllir og høllir og íløga er longu gjørd í karmarnar, sum eru sera góðir við áskoðaraplássum og øðrum, sigur Robert Vilhelmsen.

Eisini skúlarnir í høvuðsstaðnum vísa ætlanum áhuga.

– Vit funnu útav, at skúlarnir paralelt við okkum hava havt fundir við býráðið um eina rennibreyt, sigur Robert.

Sjálvt hevur Bragdið um 80 limir. Í løtuni verður runnið mest á alfaravegi.

Roynt verður at seta stovn skipað ungdómsarbeiði.

### Gera áhugabólk

Í løtuni verður arbeitt við at stovna ein áhugabólk at standa á odda fyri verkætlanini. Hesin bólkurin skal mannast við umboðum fyri Bragdið, skúlarnir og relevant ítróttafeløg, eitt nú fótbólts- og hondbóltsfeløg.

Ein fyrireikandi fundur varð hildin leygardagin. Robert letur væl at uppmøtingini, og hann sigur, at fundurin vísti, at øll tilstaðar vóru positiv yvirfyri hugskotinum.

– Tað hevur stóran týdning fyri okkum, at hugskotið fær breiðan stuðul frá nógvum feløgum, tí ein rennibreyt vil gagna øllum ítróttafeløgum við munandi betri umstøður til renning, ið er ein stórur partur av venjingunum í flest øllum ítróttagreinum, sigur Robert Vilhelmsen.

Fyrireikararnir hava ætlanir um at skipa fyri fleiri kunnandi tiltøkum í næstum.

## Fakta

Ein rennibreyt í Havn skal eftir ætlan hava seks banar, og ein vøll til kastiítróttir.

Í støðd er vøllurin innanfyri rennibreytin á støðd við ein fótbóltsvøll. Sjálv rennibreytin er 400 metrar í ummál.

Sjálv breytin er gjørd úr gummi, og kostnaðurin er einar 4-6 mió fyri sjálva breytina.

**Tríggir møguleikar eru nevndir:**

**Tórsvøllur**
Fremsta ynskið hjá teimum, ið ynskja sær eina rennibreyt í høvuðsstaðnum, er at leggja hesa við Tórsvøll. Verkætlanin inniber, at vøllurin verður fluttur longur longur eystureftir – móti Ítróttarhøllini á Hálsi. Fýra tey niðastu stólaraðini verða tikin av langsíðuni eystureftir. Hetta inniber eini áttahundrað færri sitipláss, men møguleiki er at byggja afturat ovarliga.

Sitiplássini móti Gundadalshøllini verða eisini tikin burtur, og tey kunnu fyri ein part endurnýtast við at seta tey út í hornini.

Sambært útrokningum frá Tórshavnar kommunu, fer hetta arbeiðið at kosta millum 13 og 15 mió. – alt íroknað.

Stigtakararnir til rennibreytina meta tó, at hetta kann gerast nakað bíligari.

**Marknagil**
Eitt stórt øki úti í Marknagili hevur Tórshavnar býráð sett av til ítróttaøki. Jan Christiansen sigur, at kommunan hevur rímiliga stórar konkretar ætlanir við økinum.

Økið, talan er um, liggur við Handilsskúlan og umsitingarbygningin hjá SEV.

Ongar konkretar kostnaðarmetingar eru av hesari verkætlanini, men greitt er, at umframt kostnaðin av rennibreytini skal nakað afturat.

Býráðið heldur, at økið er hóskandi, tí tað er so slætt. Stigtakararnir til rennibreytina halda hinvegin, at har er alt ov veðurhart til at kappingar.

**Ringvegurin**
Ein ætlan er at gera eitt ítróttaøki í Ovaru Hoydølum – í økinum við Shell støðina á Eystara ringvegi. Henda loysnin verður mest sannlíkt tann mest kostnaðarmikla av teimum trimum.

Kommunan eigur ikki økið, nógv arbeiði skal gerast og økið er heldur ikki sett av til ítróttaøki. Hendan loysnin er fyri stigtakararnar til rennibreytina tann næst besta.

Borgarstjórin heldur hesa loysnina vera púra burturvið, tí hon vil fara at kosta so nógv.

Jan Christiansen:

# Ørskapur at broyta Tórsvøll

**– Sum býráðsformaður má eg halda meg til samtyktina, sum sigur, at Tórsvøllur er fótbóltsvøllur. Tað skulu nøkur øgiliga góð argumentir til, um eg skal atkvøða fyri at broyta samtyktina, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn**

RENNIBREYT
*Heri á Rógvi*

Borgarstjórin í Havn er ikki serliga heitur um hugskotið, at gera Tórsvøll um til eitt stadion við rennibreyt.

– Sum býráðsformaður má eg haldi meg til samtyktina, sum sigur, at Tórsvøllur er fótbóltsvøllur, sigur Jan Christiansen.

Tað var 6. apríl 2000, at býráðið gjørdi av at broyta samtyktina fyri Tórsvøll, soleiðis at hesin gjørdist fótbóltsvøllur burturav. Àðrenn hetta var ætlanin, at ein rennibreyt skuldi gerast um Tórsvøll, men hetta gjørdist so ongantíð til nakað.

Tað er Tórshavnar kommuna, ið eigur Tórsvøll. Sjálvan raksturin stendur Tórsvallargrunnurin fyri, men tað er í síðsta enda kommunan, sum hevur ræðisrættin.

Jan Christiansen sigur, at sjálvan raksturin av vøllinum blandar kommunan seg ikki upp í.

Skal rennibreyt gerast um Tórsvøll, so skal Tórshavnar býráð samtykja tað.

– Persónliga haldi eg, at tað er ørskapur at broyta Tórsvøll aftur nú. Tað skulu nøkur øgiliga góð argumentir til, um eg skal atkvøða fyri at broyta samtyktina, sigur Jan Christiansen.

### 3 milliónir

Yvir trý ár hevur Tórshavnar kommuna sett tríggjar milliónir av til eina rennibreyt í Havn.

Hesin peningurin er settur á bók og skal nýtast til ásetta endamálið.

Borgarstjórin heldur ætlanina við Ringvegin vera burturvið, tí hetta vil kosta alt ov nógv. Hann metir, at frægasta loysnin er í Marknagili, og hann heldur, at veðurlíkindini eru nóg góð.

– Vit búgva í Føroyum, har tað er nógvur vindur. Økið í Marknagili er hampuliga veðurgott, og tað er væl egnað, sigur Jan Christiansen.

Borgarstjórin leggur afturat, at ein rennibreyt er ein dýr íløga til lutfalsliga fáar íðkarar.

### 2 milliónir

Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar býráð hevur herfyri játtað tvær milliónir afturat til Tórsvøll. Ein millión fór til at gjalda eitt lán, og ein millión fyri at snøgga umstøðurnar við uppgongdum, toiletum og øðrum. Hetta er serliga gjørt við dystinum móti Týsklandi í juni í huga.

Jan Christiansen avvísir, at tað hevur verið ætlanin, at Tórsvallargrunnurin skuldi standa fyri allari fígging sjálvur, eftir at stovnsfæið varð sett.

– Vit hava allatíðina sagt, at Tórsvøllur er ein prosess, sum fer at taka fleiri ár. Vit hava valt at lata pengar til endamálið fyri at skumpa undir prosessina, sigur Jan Christiansen.